# ítróttur

Nr. 231 • hósdagur • 2. desember 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo


# Danskur toppvenjari sum stuðul

**Avtala er fingið í lag um samstarv við Preben Larsen, sum skal hjálpa til í venjingini av yngru leikarunum hjá feløgunum**

BORÐTENNIS
*Jákup Mørk*



*Preben Larsen er ein maður, sum uttan iva kann geva sera holla leiðbeining til ungar føroyska borðtennisleikarar*

Næst seinasta vikuskifti var danski venjarin fyri fyrstu ferð við til venjingar hjá feløgunum. Talan var um ein bruttohóp upp á 16 leikarar úr Tór og TBF, og saman við Peturi Niclasen varð so koyrt á leikararnar.

Sagt verður, at ætlandi skal danski venjarin vitja her á landi við jøvnum millumbilum, og er vónin, at hetta fyrst og fremst kann skapa ein størri áhuga fyri borðtennis í Føroyum.

Hartil er ætlanin sjálvandi eisini at hækka um støðið á føroyskum borðtennis, soleiðis at talan framyvir kann gerast um munandi harðari kapping millum leikararnar. Eitt nú hevur Petur Niclasen sjálvur verið mest sum einaráðandi innan ítróttina, síðani hann í 1984 fyri fyrstu ferð vann FM-heitið, og tað er sjálvandi ikki serliga mennandi fyri ítróttina.

Um Preben Larsen er annars at siga, at hann verður roknaður millum allar bestu venjararnar innan borðtennis í Danmark. Hann hevur útbúgving sum elituvenjari, og eitt nú er hann persónligur venjari hjá Christoffer Poulsen, sum spælir á danska landsliðnum, umframt at hann eisini venur fleiri aðrar danskar topp-leikarar.

Í Danmark er borðtennis í løtuni ein ítrótt í stórari framgongd. Team Danmark, sum hevur til endamáls at stuðla elitu-ítrótti, hevur fyri stuttum boðað frá, at teir síggja borðtennis sum eina ítrótt, har heilt stórir menningarmøguleikar eru.

# MB bíðar eftir svari

Í MB eru tey nú farin at ótolnast eftir, at Dómsnevndin hjá FSF skal taka støðu í kærum, sum felagið hevur sent inn.

MB finst í opnum skrivi til FSF at, at dómsnevndin enn ikki svarað kærunum, sum felagið hevur sent inn ávíkavist 5. og 12. november.

Í reglugerðuni fyri dómsnevndina hjá FSF stendur m.a. »Í seinasta lagi tvær vikur aftaná at dómsnevndin hevur móttikið kæru, skal hon gera úrskurð og kunna partarnar um hann í innskrivaðum brævi.«

Petur Evan Djurhuus, sum er formaður í dómsnevndini ásannar, at nevndin ikki hevur viðgjørt kæruna, men hetta verður fyrsta dagin, sigur hann.

– Tað hevur tíverri drigið út. Vit hava hvør í sínum lagi verið ógvuliga upptiknir, men vónandi verður ein úrskurður gjørdur í hesi vikuni, staðfestir hann.

Tær báðar kærurnar, sum MB hevur sent inn, viðvíkja nýtsluni hjá SÍF av Rúna Olsen í dystinum millum SÍF og MB tann 3. november. Og at FS Vágar í kappingarárinum 2004 hevur gjørt nýtslu av Birgir Joensen, sum felagið sigur hevur spæliloyvi í SÍ – og ikki í FS Vágar.

Hartil skal dómsnevndin eisini taka støðu til kæru frá B68. Toftamenn kæra, at brasilski álopsleikarin, Anderson, skal hava fingið leikbann í 8 dystir eftir útvísingina í seinasta umfarinum av landskappingini.

**-jm**

# Fýra svimjarar til Danmarkar

Hósdagin fara fýra føroyskir svimjarar til Nærum á Sælandi, har tey skulu taka lut í NJM-kappingini. Tey fýra, sum landsliðsvenjarin, Petur Heðin á Fløtti hevur tikið út, eru Per S. Hansen og Beinir Danielsen úr Flot, og Jutta Thomsen og Anna K. Eysturberg úr TS

Sagt verður, at NJM er ein sera sterk kapping, so føroysku svimjararnir sleppa veruliga at royna seg. Luttakararnir í kappingini eru úr Danmark, Íslandi, Svøríki, Finnlandi, Estlandi, Noreg og so Føroyum.

Føroysku svimjararnir koma aftur mánadagin.

**-jm**



*Per S. Hansen, Beinir Danielsen, Jutta Thomsen og Anna K. Eysturberg fara hósdagin til Danmarkar at kappast í NJM*